## DAGSINS MEINING

# Stavn um stavn

Báðir partar liggja enn stavn um stavn í italska valinum. Tá ið allar atkvøður vóru taldar í morgun, hevði Prodi ein tinglim í meiriluta í undirhúsinum, meðan Berlusconi hevði ein tilsvarandi meiriluta í senatinum. Undirhús og senat eru javntsett í løggávumyndugleika, so eitt sovorið úrslit er næstan tað versta, sum henda kundi. Um hetta verður úrslitið, tá fínteljingin er liðug, so er Italia í verstu stjórnarkreppu í ártíggjur. Sum støðan er nú, krevja báðir partar sigurin, og hetta er sjálvsagt eingin haldgóð støða.

Valstríðið hevur verið óvanliga hart, og serstakliga Berlusconi hevur verið sera ófantaligur í orð og tal. Berlusconi er sum kunnugt ríkasti maður í Italia. Hann eigur dagbløð, tíðarrit, kringvarpsstøðir, fótbóltslið og stórar ídnaðarfyritøkur. Hann hevur havt óavmarkað fíggjarligt tilfeingi umframt, at hann jú hevur gjørt av, hvussu hansara egna pressa skuldi dekka valstríðið. Tað er sostatt ikki nakar serstakliga demokratiskur persónur, ið stendur á odda fyri konservativu fylkingini. Berlusconi hevur heldur eingi glæsilig úrslit at vísa á eftir fimm ár við valdinum. Hann lovaði italska fólkinum ein betri búskap og betri lívskor, men alt hevur gingið tann skeiva vegin. Vinnulóysi og búskaparlig kreppa hava eyðkent Italia hesi seinastu fimm árini. Orsøkirnar eru fleiri, eitt nú, at Berlusconi ikki vil samstarva við EU og hevur lagt seg alt ov tætt upp at USA og Bretlandi. Hartil kemur, at hann og flokkur hansara ikki hava dugað at takla altjóðagerðina sum ein møguleika, men hava teir bert sæð hetta rákið sum eina hóttan móti búskapinum og móti gomlum t.v.s. katólskum virðum. Úrslitið av hesi støðu er, at Italia er tikið á bóli og er vorðið "sjúki maður Europas". Fyritøkurnar flýggja til láglønarlond, arbeiðsloysið økist og politiska lívið kryplast, eitt nú við at løggávan er vorðin innrættað, so hon hóskar til búskaparligu áhugamál forsætisráðharrans.

Mið- og vinstrasamgongan hjá Prodi hevur boðið seg fram við einum greiðum alternativi, einum politikki, sum skuldi nútímansgera Italia og endurskapa virðingina fyri Italia og italskum politikki. Kjarnan í hesum politikki er eitt nógv tættari tilknýti til EU og ein nútímansgerð av útbúgvingarskipan, almanna- og heilsuverki umframt ein púra greið strategi fyri, hvussuleiðis Italia skal koma sum best burtur úr altjóðagerðini. Her er við øðrum orðum eitt sera greitt, og skuldi ein hildið, upplagt alternativ til ultrakonservativa politikkin hjá høgrasamgonguni. Men veljarin hevur ikki verið so sannførdur, og spurningurin er, hvør orsøkin er. Ein nærliggjandi frágreiðing er, at Berlusconi situr á mestsum allari pressuni. Hann hevur havt mestsum tíðindamonopol. Uttan mun til hvør frágreiðingin er, so er Italia framvegis "sjúki maðurin í Europa" og hetta er ikki gott fyri nakað – hvørki fyri Europa ella fyri Italia. Eitt, sum europæisku londini kundu lært av italska valinum er, at ásanna, at pressumonopol er ikki gott fyri fólkaræðið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Latið atburð okkara vera í Andanum

JOHN Í SKEMMUNI



Í hesum døgum hevur nógv verið frammi um ymiskt, ið hendir innan kristnar samkomur – har menniskju hava løgnan atburð og har ymiskt yvirnáttúrligt tykist at henda. Tá slíkt fer fram, verður sagt, at hetta er Heilagi Andin og kraft Guds.

Tað, ið vit mangan gloyma, tá talan er um Heilaga Andan er, at Andi Guds er Heilagur - at Hann altíð leiðir okkum til at liva eitt lív, ið er sermerkt av tign og sóma, sum vit lesa í Galatiabrævinum 5:22: "Men ávøkstur Andans er: Kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildleiki, góðska, trúfesti, spakføri, fráhald."

Og, tá talan er um kraft Guds, so vita vit sjálvandi, at Gud er mentur at gera, hvat tað skal verða – annars var Hann ikki Gud. – Hinvegin, so síggja vit, at megnireglan, tá tað kemur til kraft Guds, er ikki ein kraft við nógvum gangi, men heldur ein kraft, ið umbroytir menniskju frá at liva í gudloysi til at liva eitt lív í siðprýði og æru.

Tá atburður okkara er soleiðis, at hann fær menniskju at gera gjøldur burtur úr okkum og gudstrúgv okkara – tá liva vit ikki í Andanum, hesum Heilaga Anda, ið virkar fyri at fáa okkum meir og meir at líkjast frelsara okkara, Jesusi Kristi. Tá er tað ikki kraft Guds, ið virkar í okkum, men heldur hold okkara, ið sleppir fram at.

Tá Paulus skrivaði til tey í Galatia um vakra ávøkst Andans, vísir hann til sonnu kraft Guds – hesa kraft, ið helt Jesusi til krossin. Hendan kraftin sæst ikki sum nakað ónáttúrligt í lívi okkara, men er ein megi, ið heldur tí niðri, ið er av holdinum og elvir til ein atburð, ið ærir Gud. Hetta er tað, ið Paulus sigur í Galatiabrævinum 5:24-25: "Og tey, sum hoyra Kristi Jesusi til, hava krossfest holdið við lystum og girndum tess. Táið vit liva í Andanum, so latið eisini atburð okkara vera í Andanum!"

Jesus kom einaferð fram á ein mann, ið hevði sera løgnan atburð. Hann helt til í grøvunum, var settur av illum andum og hevði sera ónormalan atburð. Men, Jesus rak illu andarnar út og eftir hetta sá fólkið ein annan mann – "sita íklætnan og við seg sjálvan; og tey undraðust" (Markus 5:15).

Hetta er júst tað, ið hendir, tá Harrin sleppir inn í lív okkara við Anda Sínum. Tá gerast vit ikki løgin, men normal, soleiðis, sum Gud upprunaliga ætlaði, at vit skuldu vera.

Í Bíbliuni finna vit eisini tað øvugta av hesum – tá Ísrael vendi Gudi bakið og fór at dansa um gullkálvin. Vit lesa í 2. Mósebók 32:6 &25: "Morgunin eftir fóru tey tíðliga upp, ofraðu brennioffur og bóru fram takkoffur; síðani setti fólkið seg niður at eta og drekka og reistist so og fór at spæla. – Móses sá nú, at fólkið kendi sær ikki afturhald, við tað at Áron hevði slept teimum leysum – og hesum hildu fíggindar teirra frægd at."

Atburður teirra broyttist og var nú av slíkum slag, at "fíggindar Ísraels hildu frægd at teimum" (2. Mós. 32:25). Tað er álvarsamt, tá vit sum trúgvandi eru orsøk til, at navn Guds enntá verður spottað (Róm. 2:24).

Tað, sum okkum fram um alt tørvar í dag – eins og fyrr er, at vit halda okkum til Orð Guds og ikki lata okkum taka av fótum av øllum tí, sum kemur inn á okkum. Orð Guds lærir, at vit eru í einum andaligum bardaga – og fíggindi Guds ger alt fyri at oyðileggja verk Guds. Eydnast tað honum ikki við atsóknum, so broytir hann framferð. Hann kann enntá, sum Paulus skrivar til tey í Korint, broyta seg um til ein ljósins eingil (2. Kor. 11:13-15). Tá hevur hann lættari at sleppa inn ímillum okkara, tí hann er so ringur at kenna – og skaðin er ofta ógvisligur.

Tað, sum hendi í samkomuni í Korint var júst hetta, at mótstøðumaður Guds slapp framat við ymiskum, sum elvdi til siðloysi og óskil. Andi Guds var trokaður av og holdið slapp at ráða, og var hetta orsøkin til óskil og ófrið. Tí minnir Paulus tey á, at "Gud er jú ikki Gud óskils, men friðar" (2. Kor. 14:33).

Vit mugu heldur ikki vera blind fyri, at mótstøðumaður Guds kann gera tekin. Vit eru so skjót at halda, at bert eitt tekin hendir, at so er tað Gud. Men, latið okkum leggja okkum orð Paulusar til tey í Tessalonika í geyma: "Koma hansara verður eftir sterku virkan Satans, við øllum mátti lyginnar og teknum og undrum og við øllum svikum órættvísinnar fyri tey, sum fortapast, aftur fyri at tey tóku ikki við kærleika til sannleikan, so tey kundu verða frelst!"(2. Tess. 2:9-10). – Her síggja vit greitt, at tekin og undur eisini verða brúkt av mótstøðumanni Guds at villleiða við!

Eg vil tí í øllum kærleika áminna okkum øll á, at vit halda okkum til Orð Guds og at vit døma alt í ljósinum av tí. Tá vil alt, ið enntá kann tykjast so andaligt, ikki so lættliga taka okkum av fótum. Tá verða vit eisini spard fyri nógv óneyðug vónbrot og mong sálarsár, ið altíð eru ein avleiðing av villleiðingum.

Og, latið okkum lata Harran sleppa at mynda okkum við Orði og Anda Sínum, soleiðis, at "atburður okkara verður í Andanum". Ein atburður íbirtur av Anda Guds vil altíð elva til "eitt stilt og friðarligt lív í øllum gudsótta og siðprýði" (1. Tim. 2:2), sum virkar, at Gud verður ærdur við okkum.

Vit minnast í hesum døgum, at Frelsari okkara leið og doyði fyri at frelsa okkum og geva okkum ævigt lív. Tað kostaði Honum so dýrt! Latið okkum tí taka við áminningini í 1. Kor. 6:20: "Tit eru dýrt keypt! Ærið tí Gud í likami tykkara!"

Við ynskjum um eini signaði páskir.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.